# Bilar

Nr. 149 • hósdagur • 8. august 2002 • 76. árg.



# BMW
## - ansa eftir at bilførarin ikki sovnar

**BMW royndarkoyra í løtuni eina skipan, har eitt myndatól avdúkar, um bilførarin er ov troyttur og er við at sovna. Um vandi er á ferð, verður bilaførarin vaktur av eini ávaringarskipan**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Týsk tryggingarfeløg hava kannað 200 ferðsluvanlukkur. Í einum fjórðingi av hesum vanlukkum var orsøkin, at bilførarin var sovnaður. BMW royndarkoyra í løtuni eina ávaringarskipan, har eitt myndatól fokuserar uppá eyguni á bilføraranum og fylgir við kropsrørslunum hansara. Ein telda roknar síðan út, um tekin eru um, at bilførarin er ov troyttur. Um vandi er á ferð, verður bilførarin ávaraður av ljóssignalum. Kanningar skulu vísa hvussu sterk hesi ávaringarsignal skulu verða og hvussu nógv skal til fyri at ávara bilføraran.

*Kelda: FDM / Motor*



*BMW royndarkoyra í løtuni eina skipan sum skrásetur um bilførarin er við at sovna*


*Ávaringarskipanin á BMW-testbilinum skrásetur hvussu eyguni á meira ella minni troyttum bilførarum reagera.*

# Goodyear Classic 2002 er avlýst

**Føroysk ellisakfør vóru boðin at luttaka í donsku koyringini, Goodyear Classic 2002, fyri klassiskar bilar, ið skuldi verða leygardagin 24. august. Í gjár komu boð um at tiltakið verður avlýst**

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*

Í morgin, fríggjadagin 9. august, skuldi eftir røttum verið seinasta freist at tekna seg til Goodyear Classic 2002 koyringingina fyri ellisakfør í Keypmannahavn umráðnum. Stórur áhugi var í at fáa føroysk ellisakfør við til hesa koyring. Goodyear skuldu eftir ætlan eisini gjalda fyri uppihaldi og kostnaðin av at vera við til kappingina. Talan var um eina væl skipaða koyring eftir ávísum reglum fyri danskan motorsport. Í gjár fekk Fríðrikur Bláhamar á Super Dekk, ið umboðaði kappingina í Føroyum, at vita frá Goodyear sølustjóranum, Kenneth Saust, at teir vóru sera harmir um, at tiltakið mátti avlýsast, av tí at eitt annað stórt tiltak innan danskan motorsport skuldi vera í sama vikuskiftinum sum Goodyear Classic. Teir høvdu annars sæð fram til hesa kapping, ið fyrstu ferð varð hildin fyri tíggju árum síðan. Teir vóna tó, at tiltakið verður tikið uppaftur næsta ár.


*Goodyear sølustjórin, Kenneth Saust, greiðir her, á fundi hjá Føroya Ellisakførum, limunum frá um Goodyear Classic koyringina. Tíverri bleiv tiltakið avlýst*

# Toyota Eco Spirit Cubic koyrir 37 km/l

### Toyota Eco Spirit Cubic 1.4 (Konseptbilur)

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.4 litur V4 diesel |
| | hk (ikki upplýst) |
| 0-100 km/t | 10,0 sek |
| Toppferð | 150 km/t |
| Dekkstødd | 145/70-15 lágfriktiónsdekk |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 352,0 cm |
| Breidd | 163,0 cm |
| Hædd | 146,0 cm |
| Eginvekt | 700 kg |


*Eco Spirit er ein 4 persónabilur við sermerktum og annarleiðis designi*

**Toyota hava ætlanir um at koma við einum 3 litur bili, eins og VW Lupo 3L. Eco Spirit Cubic, ið enn er ein konseptbilur, koyrir 37 km fyri hvønn litur av diesel**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Bilurin hevur ein 1.4 litur dieselmotor við common-rail innspræning, turboløðara og einum nýggjum sótfiltri. Eins og aðrir umhvørvisvinarligir bilar hevur Eco Spirit Cubic »stop-and-go« skipan, ið ger at motorurin sløknar, tá bilurin stendur stillur og bíðar í ferðsluni. Bilurin, ið deilvís er gjørdur úr aluminium, vigar einans 700 kg. Fólk frá FDM hava royndarkoyrt konseptbilin í Fraklandi. Teir siga, at bilurin er góður at koyra og larmar lítið, hóast teir koyrdu við 150 km/t, ið er toppferðin á bilinum. Enn er tó einki sagt um nær bilurin kemur á marknaðin

*Kelda: FDM / Motor*


*Toyota Eco Spirit Cubic er enn á royndarstøði. Bilurin verður sera orkusparandi og umhvørvisvinarligur*

# Luksus »off-roadari« frá Audi

**Audi hava nógv ymisk projekt í gongd í løtuni, m.a. hendan Allradler, ið er ein luksus »off roadari«, ið verður gjørdur við BMW X5 sum fyrimynd. Her verður serliga hugsað um amerikanska marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Audi hava í mong ár gingið á odda við bilum sum trekkja á øllum 4 hjólunum. Her verður hugsað um Quattro modellini, ið hava sera góða deiling av drívmegini. Bilurin á myndini verður væntandi avloysarin hjá Audi Allroad Quattro, ið er bygdur yvir Audi A6 Avant. Motorurin verður ein V8, tann sami sum á nýggja Audi A8, ið kemur á marknaðin í heyst.

*Kelda: FDM / Motor*



*Luksus »off-roadarin«, Audi Allradler, fær sama V8 motor, sum nýggi Audi A8, ið kemur á marknaðin í heyst*

## Toyota framgongd



Eins og aðrastaðni í Evropa høvdu Toyota stóra framgongd í Danmark fyrra hálvár í ár, har teir við 8.640 seldum bilum hava ein marknaðarpart uppá 11,3 prosent. Hetta er ein vøkstur uppá 30 prosent í mun til í fjør

*Kelda: bilpriser.dk*

## Peugeot størstir



Peugeot er mest selda bilmerki í Danmark. Teir hava nú ein marknaðarpart uppá 14,3 prosent

*Kelda: bilpriser.dk*

## PSA og BMW



BMW samtakið og PSA (Peugeot / Citroën) samstarva nú um ein nýggjan bensinmotor. BMW koma at standa fyri designinum og PSA fyri menningini og framleiðsluni av motorunum, ið verða gjørdir í München

*Kelda: bilpriser.dk*